# HANDILS- & RØRSMIÐJU LÆRLINGAR

Vit sóknast eftir einum handilslærlingi og einum rørsmiðjulærlingi til høvuðsdeild okkara í Havn skjótast gjørligt…



## TÓRSHAVN

**Vit bjóða tær**
eitt áhugavert og spennandi lærupláss við nógvum avbjóðingum, har vit raðfesta tænastu, góðsku og gott handverk í tí, vit gera.

Tú verður partur av vælvirkandi virki okkara við nógvum góðum og dugnaligum starvsfólkum.

Sum lærlingur á høvuðsdeild okkara í Havn fært tú góðar arbeiðsumstøður og kemur at arbeiða sjálvstøðugt og soleiðis geva títt íkast til virksemi okkara.

**Vit vænta,**
at tú ert nærlagdur, ágrýtin og røkin og setir avíkavist kundatænastu og gott handverk í fremstu røð. Løn og setanartreytir sambært sáttmála við avvarðandi felag.

Fyrispurningar rørsmiðjulærlingur: Torbjørn Hansen á torbjorn@demich.fo ella tel 30 93 10.

Fyrispurningar handilslærlingur: Heini Joensen á heini@demich.fo ella tel 30 93 10.



Demich
Stiðjagøta 2
Postboks 378
110 Tórshavn

tel +298 30 93 10
fax +298 30 93 11
demich@demich.fo
www.demich.fo

demich

---

STARVSLÝSING

Umsóknarfreist 24. MAR



# Pakkhúsformaður til Faroe Ship

**Starvið**
Tú verður partur av einum toymi á umleið 15 starvsfólk, har arbeiðssetningurin er at skipa og samskipa operatións- og kundatænastuna í Tórshavn. Tú fært dagligu ábyrgdina av pakkhúsinum í Tórshavn og fert millum annað at taka tær av vørumóttøku, vøruútflýggjan, bingjutøming og -fylling, skráseting o.ø.

**Førleikakrøv**
Vit leita eftir einum ágrýtnum, samvitskufullum og sjálvstøðugum fólki, har samstarvsevnir, yvirlit og áhugi fyri úrslitum er av stórum týdningi. Tú hevur KT-kunnleika á brúkarastigi og áræði at fara undir nýggjar KT-avbjóðingar í pakkhúsinum. Trukkkoyrikort er ein fyrimunur.

**Lønarviðurskifti og umsóknir**
Løn og arbeiðstíð verða eftir avtalu. Umsóknir skulu sendast til Faroe Ship, Eystara Bryggja, Postboks 47, 110 Tórshavn, att.: Bergur Sørensen.

Vilt tú vita meira um starvið, ert tú vælkomin at venda tær til Berg Sørensen á tlf. 349111 ella 239111.

Vit vilja seta starvið skjótast gjørligt. Umsóknarfreistin er 24. mars 2008.

FAROE SHIP
Góð sambond síðan 1919

Faroe Ship er flutningsfyritøka, sum saman við Eimskipafelag Íslands síðan 1. juli 2004 hevur myndað altjóða fyritøkuna Eimskip Group, ið er størsta flutningsfelag í Norðuratlanshavi, við egnum rutum til Evropa, USA, Baltalond og Ruslands.

Virkisøkið hjá Faroe Ship er innflutningur, útflutningur, innlendiskoyring, agency, vøru- og frystihotell og skundflutningsfyritøkan Faroe Express.

SENDISTOVAN

---

J&K



# FØRARAR TIL BETONGBILAR

J & K Betong søkir eftir førara til betongpumpubil og betongbil. Talan er um krevjandi arbeiði og roknast kann við nógvari yvirtíð. Tann, ið settur verður, kann byrja beinanvegin, men vit eru tilreiðar at bíða eftir rætta persóninum.

Løn sambært avtalu.

Sendið umsóknina til adressuna niðanfyri, stílað til Arngrim Arngrimsson, blandimeistara.
Spurningar viðvíkjandi starvinum kunnu setast Arngrími á tel. 585025.

á Hjalla | Postboks 3179 | FO-110 Tórshavn
tel 31 50 60 | fax 31 41 94 | e-mail: betong@jkp.fo |
www.jkp.fo | Blandimeistarin tel 58 50 25

J & K Betong

HANNIS | ЗIIIBЗG

---


# HEVUR TÚ EINA GÓÐA SØGU?

Vikuskiftisvaktin hjá

SOSIALINUM & PORTALINUM

er at hitta alt vikuskiftið á

22 50 00

Ringið um tit hava søgur, hugskot og tips ella um tit vilja kunna um fundir, tiltøk, konsertir o.a., sum fer fram kring alt landið í vikuskiftinum



VIVA